# Clickhaze konsert í Klaksvík

**Tónleikabólkurin Clickhaze, sum gevur eina fløgu út fríggjadagin, fer í vikuskiftinum at hava konsert í Klaksvík**

TÓNLEIKUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík**: Clickhaze fer at hava konsert í Atlantis í Klaksvík sunnukvøldið klokkan átta. Konsertin verður fyriskipað í samstarvi við tónleikafelagið Sjey 00 í Klaksvík.

Bólkurin gevur út fløgu fríggjadagin, og verða løg av fløguni á skránni á konsertini.

Gulli Johansen, formaður í Sjey 00, sigur, at væntast kann, at atgongurmerkini til konsertina sunnukvøldið fara at ganga sum heitt breyð. Tí Atlantis tekur bert 109 fólk, og tað er ikki nógv. So tí ræður um at verða skjótur, um ein vil ogna sær eitt atgongumerki til konsertina, sum væntandi fer at vara í umleið ein tíma.

Gulli sigur, at hóast ikki nógv fólk vóru til útikonsertina fríggjakvøldið á Norðoyastevnu, so hava tey ikki mist mótið fyri tað.

- Enn hava vit ikki nakað ítøkiligt á skránni, men vit ætla at skipa fyri nøkrum konsertum aftur at, men vit eru ikki komin so langt við teimum ætlanunum enn, so tað ber ikki til at siga nakað um, hvat tað fer at verða, sigur Gulli.

Clickhaze verður eisini við á Eystanstevnukonsertini, sum verður fríggjakvøldið, men tá eru eisini aðrir bólkar við. Í Klaksvík verður tað bert Clickhaze, sum verður á pallinum.

# Grafisk listaframsýning í miðbýnum í Havn

**Í sambandi við mentanarnáttina lat ein grafisk listaframsýning upp í Snarskivuni í miðbýnum í Havn**

FRAMSÝNING
*Tíðndaskriv*

Í góðveðrinum fríggjakvøldið lat ein áhugaverd og fjølbroytt grafisk listaframsýning upp í Snarskivuni, har høvi er at síggja eitt úrval av steinprentum hjá nøkrum av okkara kendastu og virknastu listafólkum umframt steinprent hjá tveimum útlendskum listamonnum.

Snarskivan, ið er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu, húsast saman við postavgreiðsluni í gamla posthúsbygninginum í miðbýnum. Forhøllin, nevnd Torgið, verður eisini brúkt til listaframsýningar, ið mentamáladeildin skipar fyri. Vanliga er ein nýggj serframsýning at síggja hvønn mánað, og nú er Torgið so karmur um eina grafiska framsýning.

Á framsýningini eru listaverk eftir Zakarias Heinesen, Hansinu Iversen, Bárð Jákupsson, Rannvá Kunoy, Olivur við Neyst, Amariel Norðoy, Torbjørn Olsen og Kára Svensson. Útlendingarnir, ið stilla fram eru Per Kirkeby úr Danmark og Jonny Forsstrøm úr Svøríki.

Steinprentini hava listafólkini gjørt á Grafiska Verkstaðnum í Listaskálanum. Í norðara enda á gamla Listaskálanum er innrættaður væl útgjørdur grafiskur verkstaður, har arbeiðast kann við allari grafiskari tøkni. Verkstaðurin er eitt tilboð til føroysk listafólk, umframt at listafólk úr øðrum londum eisini arbeiða har.

Talan er um eina sølu-framsýning og fáast steinprentini til keyps í avgreiðsluni í Snarskivuni.

Høvi er at síggja framsýningina, tá ið opið er í Snarskivuni, mánadag - fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

# Ein størri fiskivinnustevna

**Stóra fiskivinnustevnan North Atlantic Fish Fair verður í Runavík í døgunum 29. apríl til 1. mai næsta ár. Hesaferð verður roknað við væl størri luttøku enn seinast**

FISKIVINNUSTEVNA
*Edvard Joensen*



*Runavík er vorðin karmur um afturvendandi stórtiltakið North Atlantic Fish Fair*
*Mynd: Edvard Joensen*

Runavík: Onnur útgáva av fiskivinnustevnuni North Atlantic Fish Fair verður í Runavík um mánaðarskiftið apríl-mai komandi ár. Roynt fer at verða at fáa ymsar fremmandar fiskimálaráðharrar at koma hendanveg til stevnunarnar.

Á samkomu í kappróðrarneystinum á Glyvrum fyrrapartin í gjár varð alment boðað frá, at komandi fiskivinnustevnan North Atlantic Fish Fair verður í Runavík í døgunum 29. apríl til 1. mai komandi ár.

Aftur komandi ár verður Norrøna liggjandi sum hotelskip í Runavík, meðan stevnan verður hildin. Men hesaferð fer tað at verða tann nýggja Norrøna.

Tað fer at gera, at bústaðarviðurskiftini vera mundandi betri enn seinast. Kortini er bílagt pláss á teimum trimum hotellunum i Havn, eins og Runavíkar Sjómansheim er bílagt, alt sum tað er, hesar dagarnar, stevnan er.

Smyril Line tekur sær av øllum tí, sum hevur við ferðing og gisting at gera. Bæði flogferðum ella sigling til og úr Føroyum, eins og ferðing innanlands og gisting bæði umborð á Norrønu og á hotellunum, sum eru til taks.

Í fjør var fiskivinnuráðstevnan hildin bæði á havnarlagnum, á ítróttarøkinum og á floti.

Komandi ár verður hon bara á havnarlagnum og flótandi, meðan ítróttarøkið verður at taka til, um brúk skuldið verðið fyri tí.

Av tí, at áhugin tykist rættiliga stórur eftir væl eydnaðu stevnuna seinast, hava fyrireikararnir gjørt av, at fiskivinnustevnan komandi ár verður í trimum tjøldum á havnarlagnum, eins og tvær hallir eisini fara at hýsa stevnuni.

Í fjør varð stevnan hildin í tveimum tjøldum og einari høll á havnarlagnum, umframt at aliparturin var í ítróttarhøllini.

Stevnan fer at líkjast teirri seinastu rættiliga nógv, siga fyrireikararnir, og nakað væl av tilmeldingum eru longu komnar.

Í fjør varð undirtøkan góð. 212 framsýnarar vóru við, og býtið var soleiðis helvt um helvt føroyingar og útlendingar.

Knapt 7.200 vitjandi vóru á stevnuni. Tey vóru ættað úr 19 ymiskum londum, og av teimum vóru gott hálvtsættahundrað útlendingar.

Roknað verður við, at kostanðurin at fyrireika eina slíka stevnu fer at liggja um eina fimm milliónir krónur.

# Ricardo Villar umborð á Høganesi

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Í kvøld, fríggjakvøldið 14. juni kl. 20.00, verður jazzkonsert umborð á sluppini Høganesi í Runavík.

Teir, ið fara at spæla, eru argentinski saxofonleikarin, Ricardo Villar, og føroysku tónleikararnir, Búi Dam, ið spælir elgittar, Brandur Jacobsen, ið spælir ásláttur, Rógvi á Rógvu, ið spælir trummur, og Mikael Blak, ið spælir kontrabass.

Tónleikurin, ið verður framførdur, er í stóran mun improvisatiónstónleikur.

Konsertin er partur av 25 ára hátíðarhaldinum hjá Plátufelagnum Tutl, og Ricardo Villar er og vitjar í Føroyum í hesum sambandi.






# Foreldur í Leirvík stúra fyri skúlagongdini

**– Vit kunnu á ongan hátt góðtaka, at okkara børn fáa so vánaligar innlæringarmøguleikar í mun til onnur børn í landinum. Vit góðtaka ikki frymilin, sum gevur okkara samanløgdu flokkum so vánalig kor, sigur foreldur at skúlabørnum í Leirvík**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*



*Næmingar í stórum samanløgdum flokkum hava verri innlæringarmøguleikar enn í árgangsbýttum flokkum. Nú vilja foreldur í Leirvík ikki longur lata seg lynda, at henda gongdin heldur fram*
*Savnsmynd*

Foreldur at børnum í Leirvíkar skúla vilja ikki lata sær lynda, at teirra børn ikki fáa nøktandi skúlagongd. Tey góðtaka ikki, at teirra børn fáa so vánaligar innlæringarmøguleikar í mun til onnur børn í landinum. Gjáramorgunin vórðu skriv og undirskriftir frá 31 foreldrum handað Fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum, har foreldur vísa á ótolandi støðuna.

Trupulleikin í skúlanum í Leirvík eins og á øðrum skúlum við er ov fáir tímar til skúlan. Hóast lærarar og leiðsla á skúlanum hava roynt at fingið fleiri tímar, hevur hetta ikki eydnast. Næmingartalið, sum í ár liggur um 88, hevur gjørt, at flokkar hava verið lagdir saman í fleiri ár.

– Stór misnøgd hevur verið um hetta ímillum foreldur, tí at børnini líða undir slíkum samanleggingum. Tey fáa bert intensiva frálæru helvtina av tímanum, meðan hina helvtina av tímanum mugu teir arbeiða sjálvstøðugt. Hvussu torført tað er hjá so smáum børnum at arbeiða sjálvstøðugt, meðan hin parturin fær okkurt slag av frálæru, t.d. av talvuni, kunnu vit bert ímynda okkum um, sigur foreldrini í skrivinum.

Í nýggja tímabýtislyklinum, sum Mentamálaráðið hevur gjørt at seta í gildi frá komandi skúlaári, er eingin viðbót til samanlagdar flokkar við tveimum árgangum. Hetta kann lýsast soleiðis, at ein 1. flokkur, ið er árgangsbýttur, fær 5 tímar eyka sambært nýggja býtinum, meðan ein 1. flokkur í Leirvík, sum er lagdur saman við 2. flokki og næmingatalið verður 24, ongar tímar fær eyka.

– Sostatt er ein samansettur flokkur við hvør sínum pensumi verri fyri enn ein árgangsbýttur. Sjálvandi eigur tann samanlagdi flokkurin at fáa fleiri tímar enn tann árgangsbýtti, men í veruleikanum fær hann minni, siga foreldrini.

Í sama býtislykli stendur, at ein miðalbólkastødd er 12 næmingar í handverki og list. Foreldrini í Leirvík spyrja, hvussu Mentamálaráðið kann loyva samanlegging av tveimum árgangum, har næmingatalið er 24, uttan at hesin fær kompensasjón til høvuðslærugreinirnar, tá ið 12 verður mett at vera ein miðalbólkastødd.

Foreldrini vísa á, at aðrir skúlar í landinum eru so hepnir at fáa gott 30 næmingar inn árliga. Tá kunnu hesi fara í tveir flokkar, uttan at noyðast út í samanleggingar, sum skúlar á stødd við skúlan í Leirvík eru noyddir til. Sum skilst skulu 3. og 4. flokkur leggjast saman komandi skúlaár, so næmingatalið verður 24 tilsamans, eins og í ár. Sama ger seg galdandi fyri 1. og 2. flokk.

– Býtislykilin gevur onga kompensasjón av nøkrum slagi.

Kravið frá foreldrum í Leirvík eru fleiri tímar til skúlar og at fleiri lærarar verða settir inn. Skúlastýrið í skúlanum hevur fingið áheitanina um at arbeiða fyri, at næmingarnir í Leirvík fáa fleiri tímar. Ígjár var fundur ímillum skúlastýrið og Mentamálaráðið.

# Næmingatalið í samanløgdum flokkum minkast

**Føroya Lærarafelag hevur í skrivi til Mentamálaráðið kravt, at samanlagdir flokkar í mesta lagi hava 17 næmingar, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag**

**VIÐMERKING**

Nýggi tímabýtislykilin hevur eisini verið til ummælis á nevndarfundi í Føroya Lærarafelag. Hetta var tann 6. mars í ár og nevnd felagsins hevði fleiri viðmerkingar og uppskot til broytingar til henda tímabýtislykil. Men tíverri tók Mentamálastýrið ikki hesar til eftirtektar.

Ein av viðmerkingunum var til tímabýtið hjá skúlum við færri enn 70 næmingum. Føroya Lærarafelag kravdi at fáa at vita eftir hvørjari skipan hesir skúlar fáa játtað tímar. Harafturat varð kravt, at hesir skúlar skulu hava munandi fleiri tímar enn eftir gomlu skipanini, tí tað er torførari at undirvísa í einum flokki, sum ikki er árgangsbýttur enn í einum, sum er árgangsbýttur.

Á nevndarfundi mikudagin varð skriv frá álitisfólkum Føroya Lærarafelags við skúlar við færri enn 70 næmingum, og sum sostatt ikki eru árgangsbýttir, viðgjørt. Tey nevna nakrar grundir til, at tað er torførari at undirvísa í hesum ikki árgangsbýttu flokkunum:

- Spjaðingin í samanløgdum flokki er størri enn í árgangsbýttum.
- Truplari er at náa ásettum undirvísingarmálum, tí undirvísingin verður meira smábýtt.
- Undirvísingartilfarið er ikki klárt at brúka í samanløgdum flokki. Lærarin má gera alt tilfarið sjálvur.

Nevnd Føroya Lærarafelags tekur fult undir við hesum sjónarmiðum. Tískil hevur Føroya Lærarafelag í skrivi til Mentamálaráðið kravt, at samanløgdu flokkarnir mugu í mesta lagi hava 17 næmingar, um teir skulu hava somu treytir, sum aðrir næmingar í føroyska fólkaskúlanum í dag.

Føroya Lærarafelag kann heldur ikki góðtaka, at limir felagsins, sum arbeiða á ikki árgangsbýttum skúlum, eru fyri vanbýti, tá tað snýr seg um arbeiðsumstøður.

Føroya Lærarafelag skilir ikki, hví Mentamálastýrið ikki gjørdi nakað fyri at broyta tímajáttanina, ella í hvussu so er svaraði Føroya Lærarafelag, áðrenn skipanin varð sett í verk.

# Skúlauppgáva vann

**Eg eri nógv. Eg eri ein norðurlendingur, skrivar 19 ára gamla Rannvá F. í Stórustovu av Signabø, sum hevur vunnið í norðurlendskari kapping, har endamálið var at skriva nøkur orð um Norðurlond**

NORÐURLOND
*Turið Kjølbro*

Í sambandi við, at Norðurlandaráðið í ár hevur hálvt hundrað ár á baki, varð kapping útskrivað herfyri, har endamálið var, at ung í Norðurlondum skuldu skriva eina tekst um Norðurlond í dag og um 50 ár. Nøkur hundrað ung í Norðurlondum hava sent sítt íkast, og vinnarar eru nú funnir, ein úr hvørjum Norðurlandi. Hesa vinna eina ferð fyri tvey til eitt annað Norðurland. Føroyingurin, sum vann, er 19 ára gamla Rannvá F. í Stórustovu, sum býr á Signabø og gongur á Handilsskúla á Kambsdali. Grundin til, at Rannvá sendi inn til kappingina, var ein skúlauppgáva.

– Vit fingu álagt at skriva eina uppgávu um evnið, og so kundu vit, um vit høvdu hug, senda tað, vit skrivaðu inn. At skriva sjálvan tekstin var ikki so ringt, men at avmarka meg til eina síðu var ringt. Tað er ringt at skriva stutt. Men tað er gott at fáa møguleikan at skriva nakað gott um nakað, vit eru saman um, sigur Rannvá F. í Stórustovu.

Ferðina, hon hevur vunnið, verður til Danmarkar saman við sjeikinum.

Hini sum vunnu eru Lærke Vestergaard Christensen, sum er 15 ár og býr í Bælum í Danmark, Eline B. Thomassen, sum er 17 ár og býr í Mjøndalen í Noreg, Malin Sundbom, sum er 16 ár og býr í Sandviken í Svøríki, Gígja Hólmgeirsdóttir, sum er 15 ár og býr í Reykjavík í Íslandi, og Viivi Tikkanen, sum er 20 ár og býr í Helsingfors í Finnlandi.

Teksturin hjá Rannvá eitur Ein størri liður í egnum samleika. Hann ljóðar soleiðis: Tú ert ein vera við fleiri ymsum samleikum. Yvir fyri tær sjálvum ert tú ein ávísur, við egnum samleika, í familjuni hevur tú aftur ein annan samleika, og somuleiðis tá tú ert millum vinfólk. Tá tosað verður um, hvar ein kemur frá, finnur tú samleika tín í tí bygd ella býi, tú kemur frá, og verður farið út um landoddarnar, setir tú tín samleika á ta tjóð, tú ert frá. Longur út farið verður í hesu ketu, fleiri gerast tey, ið tú deilir hendan ávísa samleika við, og fleiri tey gerast, sterkari verður hesin samleikin.

Soleiðis ert tú ein partur av Norðurlondum. Um tú fert til eitt fjarskotið land, og skal siga, hvar tú kemur frá, er ikki vist at hesi kenna júst títt land. Tá kanst tú við stoltleika og røttum ryggi siga, at títt land er limur í Norðurlondum, og fá munnu tey vera, ið ikki kenna okkurt av hesum átta vøkru londum. Í eini tílíkari løtu ert tú bundin so fast at tínum samleika við at vera norðurlendingur, tí at tá kenna fólk teg, sum ein part av Norðurlondum.

Samstarvið, ið skapar samleikin hjá hesum átta londum, ið Norðurlond umfata, hevur staðið sterkt í mong mong ár, og kemur vónandi at vara í eitt ævi-skeið. Eg eri nógv. Eg eri ein norðurlendingur.